# Umsókn um læruplássgóðkenning

| | |
|---|---|
| Yrki og sergrein | **KT-supportari** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Navn á fyritøku | | | |
| Bústaður | | Telefon | |
| V-tal | | T-postur | |

| | |
|---|---|
| Umsóknin fevnir um deild | |
| Dagligur leiðari | |
| Ábyrgdari av verkligu læruni hjá lærlingum | |
| Hevur virkið fleiri arbeiðsstaðir? | |

| | |
|---|---|
| Tal av starvsfólkum | |
| Yrkislærd í føstum fulltíðarstarvi sum KT-suppartari | |
| Útlærdir KT-supportari við meiri enn 3 ára starvsroyndum | |
| Hevur fyritøkan áður havt læruplássgóðkenning | |

***Gev gætur:***

*1. Skrásetingarprógv fyri skráseting í vinnuskránni skal leggjast við*

*2. Læru- ella sveinabræv hjá ábyrgdara av verkligu upplæruni hjá lærlingum skal leggjast við. Er eingin í føstum fulltíðarstarvi við hesi útbúgvingini, skal virkið gera viðmerking um hetta niðanfyri.*

| |
|---|
| Stutt lýsing av virkseminum hjá fyritøkuni, og tær vørur og tænastur sum fyritøkan veitir. Umframt, møguligar aðrar viðkomandi upplýsingar í samband við umsókn um læruplássgóðkenning. |
| |

**Uppgávur, lærlingurin kemur at takast við**

Fyri at virkið kann góðkennast sum lærupláss til KT-supportara, er neyðugt, at lærlingur arbeiðir við niðanfyristandandi virksemi.

Vinaliga útfyll yvirlitið niðanfyri, hvussu ofta fyritøkan arbeiðir við einstøku uppgávunum.

- Hugtakið "Javnan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum eru rutina hjá virkinum
- Hugtakið "Sjáldan" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum verða gjørdar av virkinum, men sum ikki eru rutinuuppgávur
- Hugtakið "Ongantíð" verður brúkt um arbeiðsuppgávur, sum als ikki verða gjørdar av virkinum

## Upplýsingar um útbúgvingina *(§ 5. Eftir lokin 2. og 3. skúlaskeið skal næmingurin hava ognað sær hesar førleikar)*

| **Virksemi, tilfar og arbeiðsfatan fyri verkligu læruni** | **Javnan** | **Sjáldan** | **Ongantíð** |
|---|---|---|---|
| 1. fremja innlegging og grundleggjandi uppseting av neteindum og feilfinning á netverki í sambandi við uppbygging og viðlíkahaldi av einum lokalneti | | | |
| 2. luttaka í tilgongdum til broyting, menning og effektivisering av munadyggari framleiðslu | | | |
| 3. læra frá sær, vegleiða og veita tænastu til brúkaran | | | |
| 4. innleggja, uppstiga, seta upp og nýta stýrisskipanina í einum ambætara, umframt gera brúkara- og tilfeingisfyrisiting, innlegging og uppseting av amboðum og trygd | | | |
| 5. arbeiða eftir skipaðum leisti við veitan av kt-tænastum | | | |
| 6. brúka og arbeiða eftir tí skjalfesting, sum hoyrir til kt-vinnuna, bæði á føroyskum og á fremmandamáli | | | |
| 7. binda viðkomandi ástøði saman við fyrireikingum, fremjan og eftirmeting av ítøkiligum uppgávum frá starvslæruni | | | |
| 8. leggja inn, uppstiga, seta upp, standa fyri og viðlíkahalda ambætarar í einum neti, umframt at gera feilfinning og rætting av villum | | | |
| 9. greina trupulleikar í einum neti, undir hesum sniðgeving, planleggja, seta upp og seta í verk trygdarloysnir í einum neti | | | |
| 10. greina trupulleikar í einum neti, undir hesum sniðgeving, planleggja, seta upp og seta í verk trygdarloysnir í einum neti | | | |
| 11. arbeiða við atliti at rættari handfaring av ESD- (Electro Static Discharge) og EMC- (Electro Magnetic Compatibility), í samsvari við galdandi trygdar- og umhvørvisreglur | | | |
| 12. áseta stødd, innleggja, uppseta og uppstiga eina teldu/ambætara við tólbúnaði og ritbúnaði og fremja rætting av villum á modulstigi | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 13. fremja innlegging og uppseting av samanbindingum og eindum í einum kervi, og fremja feilfinning á einum neti í sambandi við uppbygging og viðlíkahaldi av lokalneti, sum hevur uttanhýsis samanbinding | | | |
| 14. innleggja og uppseta ymisk sløg av trygdaravritum | | | |
| 15. framleiða script og minni forrit við nýtslu av scriptmáli | | | |

Umsóknin verður løgd fyri Yrkisnevndina, at taka støðu til.

Í sínum metingum um virkið kann fáa góðkenning sum lærupláss, leggur Yrkisnevndin dent á:

1. at yrkislærd fólk er á staðnum, við samsvarandi útbúgving og minst 3 ára arbeiðsroyndum, kann standa fyri upplæringini
2. at virkið javnan fremur allar tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar, sum hoyra til viðkomandi yrkisgrein
3. at virkið hevur ta útgerð, sum eru neyðug fyri at kunna útinna arbeiðsuppgávurnar smb. pkt. 2.
4. at virkið lýkur treytirnar um arbeiðsumhvørvi, sum eru ásettar í lógum og reglum um gott og trygt arbeiðs - umhvørvi.

Góðkenning av virki sum lærupláss verður latin fyri 5 ár í senn.

Viðgerðin av umsóknini um læruplássgóðkenning tekur støði í reglugerð um góðkenning av læruplássum, sum Yrkisnevndin samtykti 4. mai 2006. Partur av viðgerðini kann eisini vera ein sýnsmeting. Lógargrundarlag: Løgtingslóg nr 94 um yrkisútbúgvingar frá 1998

Fyritøkan váttar við síni undirskrift, at givnu upplýsingarnar eru rættar og í samsvari við galdandi ásetingar á Yrkisútbúgvingarøkinum.
Fyritøkan váttar samstundis, at tað er kunnugt við galdandi lóggávu á økinum og við innihaldið í viðkomandi útbúgvingarkunngerð, og at tað er ført fyri at nøkta ásettu krøvini við atliti at upplæringini innan viðkomandi yrkisgrein.

______________________________ ______________________________________

*Dagfesting* *Undirskrift virkisleiðarans*

Umsóknin skal sendast til: **yrkisdepilin@yrkisdepilin.fo**

**Útbúgvingarkunngerðin, vísur á førleikamálini í kapittul XX:**

§ 4. Eftir lokið 1. skúlaskeið skal næmingurin hava ognað sær hesar førleikar:

1) Greiða frá hvørjir tættir eru avgerandi fyri góðari kundatænastu, harumframt hvussu góð kundatænasta verður framd bæði innanhýsis í fyritøkuni og uttanhýsis hjá kundunum.
2) Kann, á fullgóðan hátt, fremja arbeiðsuppgávur við atliti at trygd og umhvørvi sambært galdandi reglum.
3) Við vegleiðing kann fremja verkseting av fyriskipanum í einum vanligum netverksumhvørvi, sum fevnur um sharefíl- og loginntrygd á einari lokalari teldu og account-trygd á einum netverki umframt innlegging av antivirusforrit á teldum.
4) Dugir at nýta grundleggjandi støddfrøðiligar hættir innan hesi evnir: tal- og symbolviðgerð, funksjónir, grafar og hagfrøði umframt at fremja útrokningar av netverkum, IP-addressum, binær og hex.
5) Skal greiða frá galdandi trygdarreglum í sambandi við arbeiði við EL-riknari útgerð, umframt tey umhvørviskrøv, sum eru galdandi við burturbeining av kt-útgerð.

§ 5. Eftir lokin 2. og 3. skúlaskeið skal næmingurin hava ognað sær hesar førleikar:

1) Fremja innlegging og grundleggjandi uppseting av neteindum og feilfinning á netverki í sambandi við uppbygging og viðlíkahaldi av einum lokalneti.
2) Luttaka í tilgongdum til broyting, menning og effektivisering av munadyggari framleiðslu.
3) Læra frá sær, vegleiða og veita tænastu til brúkaran.
4) Innleggja, uppstiga, seta upp og nýta stýrisskipanina í einum ambætara, umframt gera brúkara- og tilfeingisfyrisiting, innlegging og uppseting av amboðum og trygd.
5) Arbeiða eftir skipaðum leisti við veitan av kt-tænastum.
6) Brúka og arbeiða eftir tí skjalfesting, sum hoyrir til kt-vinnuna, bæði á føroyskum og á fremmandamáli.
7) Binda viðkomandi ástøði saman við fyrireikingum, fremjan og eftirmeting av ítøkiligum uppgávum frá starvslæruni.
8) Leggja inn, uppstiga, seta upp, standa fyri og viðlíkahalda ambætarar í einum neti, umframt at gera feilfinning og rætting av villum.
9) Greina trupulleikar í einum neti, undir hesum sniðgeving, planleggja, seta upp og seta í verk trygdarloysnir í einum neti.
10) Innleggja, seta upp og við fyrispurningum veita úttøkur úr dátugrunnum
11) Luttaka í sniðgeving og uppbygging av minni lokalnetum, umframt at fremja innlegging og uppseting av eindum í einum neti.
12) Arbeiða við atliti at rættari handfaring av ESD- (Electro Static Discharge) og EMC- (Electro Magnetic Compatibility), í samsvari við galdandi trygdar- og umhvørvisreglur.
13) Áseta stødd, innleggja, uppseta og uppstiga eina teldu/ambætara við tólbúnaði og ritbúnaði og fremja rætting av villum á modulstigi.
14) Fremja innlegging og uppseting av samanbindingum og eindum í einum kervi, og fremja feilfinning á einum neti í sambandi við uppbygging og viðlíkahaldi av lokalneti, sum hevur uttanhýsis samanbinding.
15) Innleggja og uppseta ymisk sløg av trygdaravritum.
16) Framleiða script og minni forrit við nýtslu av scriptmáli.

.

Les meira í kunngerðini her